

# Mánaðarbræv

Sendistova Føroya í Reykjavík

Mai 2016

## KOMANDI TILTØK

2. juni fer sendimaðurin á fund við Vælferðarmálaráðið um nýggju medisinallógina, sum er løgd fyri Altingið.

6. juni um kvøldið tekur sendimaðurin lut í hátíðarhaldinum í sambandi við svenska tjóðardagin.

8. juni heldur sendimaðurin fyrilestur um Føroyar í Rotary Club Reykjavík.
Um kvøldið luttekur sendimaðurin í móttøku hjá enska sendiharranum í sambandi við føðingardagin hjá "Her Majesty Queen Elizabeth II"
10. juni um kvøldið luttekur sendimaðurin í "National Day of Russia"

17. og 18. juni luttekur sendimaðurin í íslendska tjóðarhátíðarhaldinum, sum Uttanríkisráðið, Altingið og forsetin skipa fyri.




*Mynd 1. Veljarakanningin frá 30. mai 2016*

## NÝGGJUR FORSETI

Tá ið freistin, at bjóða seg fram til forsetavalevni í Íslandi, var úti á midnátt 20. mai, vóru tað 9 valevni, sum høvdu lokið treytirnar, 5 menn og 4 kvinnur.
Annars eru krøvini fyri at kunna stilla upp tey, at ein er 35 ára gamal, hevur savnað 1.500 undirskriftir, hevur atkvøðurætt í Íslandi og er íbúgvi í landinum.

> *»Nýggjur forseti verður settur inn í embætið 1. august og eftir veljarakanningunum at døma, so verður tað helst Guðni Th. Jóhannesson«*

Av teimum 9 valevnunum, eru tað serliga tríggir, sum gera vart við seg í veljarakanningum. Teir eru søgufrøðingurin, Guðni Th. Jóhannesson, fyrrverandi forsætisráðharrin, Davíð Oddsson og rithøvundurin Andri Snær Magnason. Teir hava allir ógvuliga ymisk bakstøði og ymisk sjónarmið á forsetastarvið.

**Guðni Thorlacius Jóhannesson** varð føddur í 1968, hann er doktari í søgufrøði og arbeiðir sum lærari á Háskúla Íslands. Í seinastu veljarakanningini fær hann heili 60% av atkvøðunum. Veljararnir hjá Guðna eru væl spjaddir, men tað, sum er mest eyðsýnt er, at nógv flestar kvinnur velja hann. Áleið 75% av kvinnunum, sum vóru spurdar í kanningini, siga seg velja Guðna. Guðni hevur eisini mestu undirtøku millum tey, sum velja vinstravent, men hóast tað, so fær hann eisini nógvar atkvøður frá teimum, ið vanliga velja høgravent. Møguliga er orsøkin tann, at Guðni hevur sagt, at forsetin skal vera ópolitiskur.

**Davíð Oddsson** varð føddur í 1948 og hann hevur verið politiskt aktivur í nógv ár. Hann legði út sum býráðslimur í Reykjavíkar Kommunu og bleiv seinni borgarstjóri. Seinni fór hann uppí landspolitikk og var Davíð forsætisráðharri frá 1991-2004 og uttanríkisráðharri frá 2004-05. Eftir at hansara politiska yrkisleið endaði, hevur hann verið stjóri í Seðlabankanum og síðani 2009 ritstjóri á Morgunblaðnum. Davíð fær 18,5% av atkvøðunum í seinastu kanningini og nærum allar atkvøðurnar eru frá høgravendum veljarum. Eisini eru tað flest menn og veljarar eldri enn 68 ár, ið velja hann.

**Andri Snær Magnason** varð føddur í 1973 og er útbúgvin innan íslendskt mál. Hann lýsir seg sjálvan sum rithøvund, men tekst eisini við onnur ting, sum nevndararbeiði og er fyrilestrarhaldari. Andri Snær fær flestar atkvøður frá teimum ungu og veljarum, sum eru búsitandi í høvuðsstaðarøkinum. Hansara veljarar eru flest allir vinstravendir og



Mynd 2. Guðni Th. Jóhannesson

hevur hann mesta undirtøku millum veljarar hjá Piratunum. Andri Snær fær einans 11% av atkvøðunum, men hóast tað, er hann tað valevnið, ið fær triðflestar atkvøður í kanningini.

Tann av hinum valevnunum, sum fær bestu undirtøku, er:
**Halla Tómasdóttir** varð fødd í 1968 og er útbúgvin búskaparfrøðingur, og hon starvast við at halda fyrilestrar runt um allan knøttin. Tá fyrstu veljarakanningarnar vórðu gjørdar, fekk Halla næstan 9%, men síðani Guðni hevur bjóðað seg fram, er hon farin heilt aftur á 4%.
Hini, sum bjóða seg fram, eru Ástþór Magnússon, Elísabet Kristín Jökulsdóttir, Guðrún Margrét Pálsdóttir, Hildur Þórðardóttir og Sturla Jónsson. Tey fingu tó øll áleið 1% av atkvøðunum í seinastu kanningini, og tí verða tað neyvan tey, sum fara at hótta leiðsluna hjá Guðna.
*Sí/les meira her (tekstur og talvur á íslendskum)*

## AVMARKINGAR Á PRIVATA ÚTLEIGING.

Íslendingar hava nærum mist takið á ferðavinnuni, ella soleiðis lýsir The Guardian í øllum førum íslendsku støðuna. Í greinini verður ferðavinnan viðgjørd í mun til, hvørji samfelagslig árin, hon hevur havt. Millum annað verður tosað um avleiðingarnar, sum Airbnb (ein heimasíða sum bjóðar út privatar bústaðir til leigu) hevur á húsamarknaðin, serliga í høvuðsstaðarøkinum. Mett verður, at Airbnb-marknaðurin er vaksin við 124% uppá eitt ár og tað verða bert bygd gistingarhús til 30% av tørvinum í ár í høvuðsstaðnum. Hetta hevur bæði árin á miðbýin, har ið nærum einans ferðafólk eru, og eisini er tað vorðið nógv torførari hjá íslendingum, sum vilja búsetast inni í Reykjavík, at finna bústað.
Stjórnin vil tískil seta tiltøk í verk, sum avmarka Airbnb-møguleikarnar. Tosað verður um at skera skattafría dagatalið niður í 90 dagar, so at skattur skal gjaldast, um íbúðir verða leigaðar út longur enn ásetta árliga dagatalið. Arbeitt verður eisini við at fáa í lag beinleiðis ferðir millum umheimin og Egilsstaðir/Akureyri, fyri at lætta um trýstið á høvuðsstaðin.
Ferðavinnan í Íslandi er nú áleið 34% av útflutninginum aftur ímóti 18% í 2010, og eru tað eisini ymsir vansar við tí. The Guardian nevnir, at hendir ein náttúruvanlukka aftur, sum Eyjafjallajøkull, so verður íslendski búskapurin ógvuliga hóttur aftur.

*Les meira her (á enskum)*



Mynd 3. Ferðavinnan leggur stórt trýst á bústaðarmarknaðin í Reykjavík.

## STUTT LÝSING AV FERÐAFÓLKINUM Í ÍSLANDI

Ferðamálastofa Íslands ger javnan umfatandi kanningar av ferðafólkinum, sum kemur til Íslands. Seinasta stóra kanningin varð gjørd yvir summarið 2014.
Vanliga ferðafólki hevur ein miðal aldur, sum er áleið 39 ár, meðan stórsti einstaki bólkurin er 25-34 ár (32,1%) og javnt er býtt millum kynini. Yvir helmingurin av teimum, sum vitja, eru vælútbúgvin og áleið 30% vera í kanningini bólka sum "professionel". Næst stórsti einstaki bólkurin eru lesandi, áleið 15%. Langt tann stórsti parturin av ferðafólkunum, koma eisini frá húsarhaldum, sum hava høga ella miðal inntøku.
Ferðafólkini hava oftast frætt um Ísland, sum ferðamannaland, á netinum (52%), men nógv meta eisini, at tey ongantíð hava verið varug við lýsingar ella tílíkt um landið (27%). Í samband við tað, birtist hugskotið um at koma til Íslands, oftast burtur úr einum áhuga fyri náttúru sum heild, ella kemur hugskotið frá vinum og kenningum, ið vita um landið. Langt tann stórsti parturin av teimum, sum so koma til Íslands, meta at tað er náttúran sum dregur mest (38%) í meðan áleið 20% sigur at tað er Íslendska mentanin og søgan, ið dregur mest.
*Sí stóru kanningina her (á enskum 343 síður)*

## FISKISKAPURIN NÓGV ØKTUR Í APRÍL Í ÁR



Stór hækking er í fiskiskapinum, um man samanber fongin frá apríl í fjør við apríl í ár. Í alt vórðu 104 tons veidd í ár, og er hetta 39% meira enn í apríl í fjør. Uppsjóvarfiskiskapurin hækkaði við heili 60%, frá 36.000 tons til 58.000 tons, meðan samlaða veiðan av botnfiski hækkaði við 17%. Samlaða mongdin, sum varð veidd yvir allar tólv mánaðirnar frá mai 2015 til apríl 16, lækkaði tó við 13% samanborið við undanfarin ár. Virði av veiðini fyri apríl mánað var knapt 33 % hægri, samanborið við apríl 2015.

Millum annað, hækkaði toskafiskiskapurin við 29% í ár og hýsufiskiskapurin við 47%. Av uppsjóvarfiskasløgunum var tað einans svartkjaftur, ið varð veiddur.

Ein partur av frágreiðingini um, hví fongurin er so nógv hækkaður í apríl í ár, samanborið við í fjør, stendst møguliga av, at í fjør var páskafrítíð í apríl mánað, meðan hon var í mars í ár.

## GIVIN VIÐ SØLU AV HAVALAKJØTI Í HÚSAVÍK




Felagið Norðursiglingar, ið stendur fyri hvalaferðum í Húsavík, hevur gjørt samstarvsavtalur við matvøruhandlarnar Nettó og Krambúðina um, at handlarnir ikki skulu selja hvalakjøt í Húsavík. Avtalan er gjørd til frama fyri slagorðinum "Húsavík – the Whale Capital of Iceland", og metir Norðursiglingar at søla av hvalakjøti stendur í beinleiðis andsøgn til herrópið. Sambært Norðursignlingar, styrkir avtalan Húsavík, sum hvalabý burturav og gevur tað enn meiri møguleikar í nærumhvørvinum við tí stóra vøkstrinum hjá ferðavinnuni.

*Sí meira her*

## STYRKT SAMSTARV MILLUM ÍSLAND OG GRØNLAND



Ísland fekk herfyri nýggjan uttanríkisráðharra, Lilju Alfreðsdóttur, og í sambandi við tað, høvdu Lilja og Vittus Qujaukitsoq, grønlendski uttanríkisráðharrin, ein telefonfund. Høvið var til at ynskja Lilju til lukku við starvinum og at styrkja samstarvið um felags áhugamál.

Telefonfundurin gav ráðharrunum høvi til at gera status í samstarvinum millum londini, sum hevur støði í felagsyvirlýsingini frá 2013, sum er grundarlagið fyri samstarvi innan fiskarí, heilsu, ferðavinnu, handil og djóralæknafrøðiliga økið.

Serliga vórðu trý tiltøk umrødd, sum partarnir nevna í felags skrivi. Tað fyrsta var samstarv um flogferðsluna, sum higartil hevði riggað væl, og báðir partar vóru áhugaðir í at halda fram við at arbeiða fyri tryggari flogferðslu og virkisføri í flogferðsluni og størri nýtslu av flogvøllum.

Síðani varð tosað um, at finna eina loysn til tey grønlendsku ferðafólkini, ið hava matvørur við sær, og millumlenda í Íslandi. Íslendska stjórnin heldur seg hava funnið eina loysn á trupulleikanum og í sambandi við tað, var tað triðja evnið at framleiða ein bókling, sum upplýsir um lóggávuna til tey ferðafólkini, sum hava tørv á tí.

Seinast umrøddu ráðharrarnir teirra felags trúgv uppá framhaldandi samstarv, sum gevur møguleika fyri umbýting av serfrøði til gagns fyri londini bæði. Grønland og Ísland hava nógv felags áhugamál og ynski um tættari samstarv, eisini á tí arktisku dagsskránni, har tættari samskifti millum Ísland og Grønland kann styrkja teirra geo-strategisku støðu. Harumframt vilja londini arbeiða fyri einum øktum handilssamstarvi.

*Sí meira her (á donskum)*


### Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.tinganes.fo
Finn okkum á Facebook

## VITJAN Í VESTFIRÐUM




*Mynd 4. Vitjað varð í Vestfirðum í byrjanini av mai mánað.*

6. og 7. mai, var sendimaðurin og vitjaði í Vestfirðum. Vitjað var m.a. hjá borgarstjóranum í Ísafirði, Savnshúsið í Ísafirði, Bygdasavn Vestfjarða, Havnameistaran í Ísafirði, Háskúlasetur Vestfjarða, 3X Technology, Kerecis, Borea Adventures, danska konsulin í Vestfirðunum, borgarstjóran og skúlastjóran í Súðavík.

Áhugavert var at síggja, hvussu eitt øki, sum hevur verið meira ella minni eitt fiskivinnuøki, hóast tað hevur mist væl av fiskikvotum, hevur megnað at fingið og sett á stovn fleiri hátøkniligar fyritøkur, sum hava ment seg og standa seg væl. Ísafjørður er vinarbýur við Runavíkar kommunu (áður Skála kommuna) og hevur borgarstjórin áhuga í, at gera eina vitjan til Føroyar í hesum sambandi. Somuleiðis nevndi borgarstjórin í Súðavík, at hann kundi hugsað sær at komið til Føroya nú, tað í ár eru 20 ár síðani, at føroyingar lótu eina peningagávu til m.a. Súðavík, eftir herviliga omanlopið í 1995. Borgarstjórarnir umrøddu møguleikan, at gera vitjanina í felag og um møguligt í september mánað í ár. Stórur áhugi er, at fáa í lag samstarv við Føroyar á fleiri økjum.

## FELAGSNEVNDARFUNDUR (HOYVÍKSSÁTTMÁLIN)

9. og 10. mai, luttók sendimaðurin í felagsnevndarfundi í Føroyum, har íslendsk og føroysk embætisfólk møttust í sambandi við árliga felagsnevndarfundin. Á skránni vóru aktuell mál, sum partarnir viðgjørdu. Fleiri mál eru loyst, onnur eru ávegis til at at verða loyst og onnur eru enn at finna sína loysn. Eitt grønlendskt embætisfólk tók lut í fundinum, sum eygleiðari á fyrsta sinni. Sum heild ein góður og væleydnaður felagsnevndarfundur. Seinni í ár verður ætlandi ein ráðsfundur, har uttanríkisráðharrarnir hjá báðum londunum møtast.

## VITJAN AV BISKUPI OG PRESTUM.



*Mynd 5. Bispur og prestar á vitjan í Sendistovuni.*

24. mai var biskupur og prestarnir, ið vóru á vitjan í Íslandi og vitjaði sendistovuna. Sendimaðurin greiddi frá virkseminum hjá sendistovuni. Eisini varð spurt um tilgongdina viðv. yvirtøkuna av fólkakirkjuni, sum sendimaðurin sjálvur hevði staðið fyri á sinni. Biskupur og prestarnir lótu væl at vitjanini í Íslandi og greiddu frá, at fylgið hevði fingið nógv burturúr. Ætlanin er at styrkja samstarvið millum føroysku og íslendsku kirkjuna. Sendistovan bjóðaði seg til at veita hjálp í hesum sambandi. Tað var bispur fegin um og vildi gera nýtslu av hesum.

## VITJAN AV 7. FLOKKSNÆMINGUM



*Mynd 6. Elsba saman við næmingunum.*

31. mai, hevði sendistovan vitjan av fimm 7. floks næmingum frá Hlíðaskóla í Reykjavík. Næmingarnir skuldu í sambandi við eina uppgávu, vitja ymiskar stovnar inni í miðbýnum og har ímillum var sendistovan ein av teimum. Elsba og Bartal tóku ímóti teimum og svaraðu spurningum, sum næmingarnir settu. Næmingarnir fingu bóklingar og føroyakort við sær, tá tey fóru glað og fróð avstað.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**